# Vága kommuna

## FUNDARBÓK 2013

**26**/04-06-2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur** **nr. 8.**<br>Tíð: **29. mai kl. 18⁰⁰.**<br>Stað: **Miðvágs Skúli** | Almennur fundur | |
| Fundardagar í 2013:<br><br>07/01, 30/01, 13/02, 27/02, 20/03, 17/04, 29/05, | **Møtt:**<br>Johannes Ellefsen, Dánial Johansen, Marjus Dam, Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Jógvan Sjúrður Hansen, Jonhard Joensen, Albert Ellefsen, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg og S. Jóhannis Joensen.<br>Skrivari: Georg Hansen | **Uttan:** |

| | |
|---|---|
| Mál nr. 2012-11-00443<br>Roknskapur fyri Vága kommunu árið 2012.<br>F.N. mælir til at samtykkja roknskapin. | Samtykt. |
| Mál nr. 2013-21-00041<br>Uppskot frá skúlastjóranum um tillaging av lærarastovuni og serstovu í Miðvágs Skúla.<br>M.Tr.N. viðmælir.<br>T.N. viðmælir.<br>F.N. mælir til, at skúlin fær eina meirjáttan á konto 1651 uppá kr. 50.000,-. | Samtykt. |
| Mál nr. 2013-47-00119<br>Val av tiltakslimi í vatn- og hegnsýnisnevndina fyri Vága kommunu, nú Jóannes Johansen hevur sagt seg úr nevndini.<br>T.N. mælir til at velja Finnur Vang sum tiltakslim.<br>F.N. mælir til at velja Finnur Vang sum tiltakslim. | Samtykt at velja Finnur Vang sum tiltakslim.<br><br>Albert Ellefsen og Johannes Ellefsen luttóku ikki í viðgerðini. |
| Mál nr. 2012-42-00078<br>Sólgerð og Jens Andru Zachariasen søkja at kommunan luttekur í kostnaðinum av at gera stuðlamúr á grundstykki teirra matr. nr. 153h í Sandavági.<br>T.N. mælir frá at luttaka í kostnaðinum.<br>F.N. mælir frá at luttaka í kostnaðinum. | Samtykt ikki at luttaka í kostnaðinum. |
| Mál nr. 2013-46-00111<br>Jákup Egholm søkir vegna bátaeigarar um, at av skúrunum, sum nýttir vera til skúlastovur á Giljanesi, verður settur við bátahyljarnar í Miðvági, tá skúrarnir ikki longur vera nýttir til skúlastovur.<br>M.Tr.N. mælir til at svara, at málið verður tikið uppaftur, tá skúlin ikki longur brúkar skúrarnar.<br>T.N. tekur undir við M.Tr.N.<br>F.N. tekur undir við M.Tr.N. og T.N. | Samtykt at svara, at málið verður tikið uppaftur, tá skúlin ikki longur brúkar skúrarnar. |

# Vága kommuna
**FUNDARBÓK 2013**
**27**/04-06-2013

| | |
|---|---|
| **Fundur** **nr. 8.**<br>Tíð: **29. mai kl. 18$^{00}$.**<br>Stað: **Miðvágs Skúli** | Almennur fundur |

| | | |
|---|---|---|
| Fundardagar í 2013:<br><br>07/01, 30/01, 13/02, 27/02, 20/03, 17/04, 29/05, | **Møtt:**<br>Johannes Ellefsen, Dánial Johansen, Marjus Dam, Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Jógvan Sjúrður Hansen, Jonhard Joensen, Albert Ellefsen, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg og S. Jóhannis Joensen.<br>Skrivari: Georg Hansen | **Uttan:** |

| | |
|---|---|
| Mál nr. 2013-23-00090<br>“Pushing up Daisies” søkir um stuðul í sambandi við fløguútgávu.<br>M.Tr.N. mælir til at veita stuðul.<br>F.N. mælir til at veita ein stuðul uppá kr. 3.000,-.<br>Peningurin verður tikin av játtanini til Mentan. | Samtykt at veita ein stuðul uppá kr. 3.000,-.<br><br>Marjus Dam luttók ikki í viðgerðini. |
| Mál nr. 2013-23-00091<br>Vága Tónleikafelag søkir um at sleppa at lána fimleikahøllina ókeypis tann 18. mai 2013. Eisini verður søkt um stuðul uppá kr. 6.000,-.<br>M.Tr.N. mælir til at lána teimum fimleikahøllina ókeypis. Eisini verður mælt til at veita stuðul.<br>F.N. mælir til at leiga høllina ókeypis og lata fíggjarligan stuðul uppá kr. 3.000,-.<br>Peningurin verður tikin av játtanini til Mentan. | Samtykt at leiga høllina ókeypis og lata fíggjarligan stuðul uppá kr. 3.000,-. |
| Mál nr. 2013-24-00092<br>Miðvágs Róðrarfelag søkir um fíggjarligan Stuðul.<br>M.Tr.N. mælir til at stuðla við kr. 45.000,-.<br>F.N. mælir til at stuðla við kr. 45.000,-. | Samtykt at stuðla við kr. 45.000,-. |
| Mál nr. 2013-24-00079<br>VágaSkot søkir um fíggjarligan stuðul.<br>M.Tr.N. mælir til at veita kr. 10.000,- í stuðuli.<br>F.N. mælir til at veita kr. 10.000,- í stuðuli. | Samtykt at veita kr. 10.000,- í stuðuli. |
| Mál nr. 2013-21-00094<br>Uppskot frá skúlaleiðsluni og skúlastýrinum um at broyta navnið á Miðvágs/Sandavágs skúla til “Skúlin á Giljanesi”.<br>M.Tr.N. viðmælir. | Samtykt. |

# Vága kommuna
## FUNDARBÓK 2013
**28**/04-06-2013

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 8.**<br>Tíð: **29. mai kl. $18^{00}$.**<br>Stað: **Miðvágs Skúli** | Almennur fundur | |
| Fundardagar í 2013:<br><br>07/01, 30/01, 13/02, 27/02, 20/03, 17/04, 29/05, | **Møtt:**<br>Johannes Ellefsen, Dánial Johansen, Marjus Dam, Rósa Samuelsen, Egil Petersen, Jógvan Sjúrður Hansen, Jonhard Joensen, Albert Ellefsen, Dánjal Thomsen, Marin Bláberg og S. Jóhannis Joensen.<br>Skrivari: Georg Hansen | **Uttan:** |

| | |
|---|---|
| Mál nr. 2013-41-00076<br>Malfrid S. Joensen, Mogens Heinesen, Allan H. Hansen, og Joan Joensen søkja um marknaumskipan millum matr. nr. 120c og 284 í Miðvági.<br>T.N. viðmælir. | Viðmælt. |
| Mál nr. 2013-21-00137<br>Uppskot frá umsjónarmonnunum á Skúlanum um, hvussu takið á smíðstovuni á Giljanes Skúla skal tettast. Mettur kostnaður er umleið kr. 400.000,-.<br>F.N. Mælir til at umvæla takið á millumbygninginum.<br>Nevndin mælir til at veita eykajáttan til konto 1651 RS410 ( Skúlin). | Samtykt. |
| Mál nr. 2013-11-00154<br>Vága Bókasavn – fíggjarætlan fyri 2014.<br>Kommunustudningur í 2014 verður kr. 100.000,-.<br>F.N. mælir til at góðkenna fíggjarætlanina fyri 2014. | Samtykt. |

Fundurin lokin kl. $19^{00}$.